Til
Fjølmiðlarnar

Tórshavn, 20. september 2016

Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu hevur síðan 1989 kannað hugburð, atburð og vitan viðvíkjandi m.a. rúsevnum hjá næmingunum í 9. flokki. Henda kanning er gjørd sum ein partur av European School Survey Project on Alcohol and other Drugs (ESPAD), har millum 30 og 35 lond í Evropa luttóku árini 1995, 1999, 2003, 2007 og 2011. Seinasta kanningin fór fram á vári 2015, hesaferð saman við 35 øðrum londum. Tilfarið er nú skrivað saman í bók, sum verður almannakunngjørd 20. september í øllum Evropa.

Kanningin er gjørd í samstarvi millum Fólkaheilsuráðið og Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu. Ólavur Jøkladal frá Fólkaheilsuráðnum var samskipari og var sjálvur úti hjá hvørjum skúla við spurnabløðunum.

Allir næmingar í 9. flokki, sum vóru í skúla kanningardagin, fingu høvi at svara spurningunum. Kanningin var skipað soleiðis, at hon minti um próvtøku, tí næmingarnir sluppu ikki at tosa saman ella at samanbera svar. Ei heldur skuldu næmingarnir seta navn sítt á spurnablaðið, sum bleiv lagt í ein læstan kassa til hagfrøðiliga viðgerð á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu. Hetta tilfar er síðani sent okkara samstarvspørtum í ESPAD til hagfrøðiliga viðgerð og samanskriving í bók, har tað ber til at samanbera londini.

**<u>Um kanningina 2015 er stutt at siga:</u>**

Kanning bleiv gjørd í døgunum 2. til 25. mars (tó ein skúli 17. apríl). Íalt luttóku 35 flokkar í 21 skúlum. Heili 511 ella 88,3% av øllum næmingum, føddir í 1999, svaraðu spurningunum. Her skulu vit siga frá nøkrum av meginúrslitunum.

**<u>Tubbaksroyking</u>**
10,2% (22,2% í 2011) av dreingjunum og 2,6% (14,9% í 2011) av gentunum søgdu seg at hava roykt dagliga seinastu 30 dagarnar.
2,2% (8,9% í 2011) av øllum næmingunum søgdu seg roykja dagliga, longu tá teir vóru 13 ára gamlir ella yngri.
18,8% (30,7% í 2011) høvdu roykt onkuntíð seinastu 30 dagarnar.

Brúka vit nakrar av undanfarnu kanningunum til samanberingar, síggja vit, at royking nú er minni enn nakrantíð millum hesi 15 ára gomlu: Í 1996 roykdu 39% dagliga, í 1997 37%, í 1998 30%, í 1999 28%, í 2003 33%, 2007 21%, 2011 19% og í 2015 8%. Her hava vit øll árini brúkt sama spurning: ”Hvussu ofta hevur tú roykt sigarettir seinastu 30 dagarnar?”. Síðani eru hesir svarmøguleikarnir lagdir saman:

- 1-5 sigarettir um dagin
- 6-10 sigarettir um dagin
- 11-20 sigarettir um dagin
- Meira enn 20 sigarettir um dagin

**<u>Snús</u>**
Sum tað sæst av talvuni niðanfyri er talið av teimum, sum hava snúsað seinastu 30 dagarnar vaksi í mun til undanfarnar kanningar.

| | Seinastu 30 dagarnar | Seinastu 12 mánaðirnar | Meira enn 12 mánaðir síðan | Ongantíð í lívinum |
|---|---|---|---|---|
| 2003 Snús | 1,8% | 7,9% | 13,6% | 86,4% |
| 2007 Snús | 4,5% | 10,0% | 14,0% | 86,0% |
| 2011 Snús – Spurningurin var ikki við í 2011 | - | - | - | - |
| 2015 Snús | 15,6% | 11,1% | 11,5% | 61,8% |

**E-sigarettir**

Fyri fyrstu ferð hava vit spurt, um næmingarnir høvdu roynt e-sigarettir og teir svaraðu soleiðis:

| | Ja, seinastu 30 dagarnar | Ja, seinastu 12 mánaðirnar | Ja, meira enn 12 mánaðir síðan | Ongantíð |
|---|---|---|---|---|
| Hevur tú roynt roykt e-sigaretteir? | 8,9 | 22,7 | 12,3 | 56,1 |

**Rúsdrekka**

Seinastu 30 dagarnar søgdu 62.3% av næmingunum seg ikki hava smakkað rúsdrekka. Til samanberingar var hetta tal 55,7% í 2011.
Seinastu 30 dagarnar høvdu 10,3% drukkið seg fullan. Í 2011 var hetta tal 10,5%.

**Hassj**

Seinastu 30 dagarnar søgdu 1,2% av næmingunum seg hava roynt hassj. Hetta tal var í 2011 1,3%.

**Sniffað**

Seinastu 30 dagarnar høvdu 2,4% sniffað, t.d. lím og tendraragass. Í 2011 1,2%.

**Rúsevni annars í lívinum**

| | 2015 | 2011 | 2007 |
|---|---|---|---|
| Amfetamin: | 0,2% | 0,9% | 0,5% |
| LSD: | 0,4% | 0,4% | 0,5% |
| Crack: | 0,4% | 0,4% | 0,5% |
| Kokain: | 0,4% | 1,4% | 0,9% |
| Heroin: | 0,2% | 0,7% | 0,5% |
| Ecstasy: | 0,4% | 1,1% | 0,7% |
| Soppar: | 0,8% | 1,6% | 0,5% |

Lágu tølini omanfyri eru á leið tey somu, sum í teimum tveimum undanfarnu kanningunum.

**Niðurstøða**

Samanbera vit rúsevnanýtsluna í Føroyum við hini londini í Evropa eru vit framvegis millum tey, sum hava minstu nýtsluna av rúsevnum. Tó skal sigast, at viðvíkjandi rúsdrekka liggja vit ikki í botninum í mun til hini londini – heili 10% av hesum ungu fólkunum søgdu seg hava drukkið seg full seinasta mánaðin. Hetta tal er neyvt tað sama sum í kanningini í 2011, so mest sannlíkt er hetta ein veruligur heilsutrupulleiki millum ung.

Góðu tíðindini eru, at sigarettroyking er minkað stórliga millum tey ungu hesi seinastu 20 árini. Í 1996 royktu út við 40% dagliga og nú í 2015 bert 8%. Mest sannlíkt eigur miðvísa arbeiðið hjá Fólkaheilsuráðnum úti í skúlunum sín part av æruni fyri stóru minkingina. Tað er bert at vóna, at aðrar nikotinkeldur ikki koma í staðin fyri sigarettirnar, nevniliga snús og e-sigarettir.

Hjálagt eitt spurnablað, har vit hava sett inn svarini í prosentum av øllum 511, sum svaraðu. Eisini viðhefta vit ESPAD frágreiðingin og Power Point myndir, har tað ber til at samanbera londini. Um okkurt er ógreitt ella torskilt, vilja vit fegin hjálpa til at greina tað nærri. Eisini ber til at gera neyvari hagtalsligar útgreiningar, um onkur hevur tørv á tí. Tó skulu vit minna á, at vit ikki vilja ella kunna býta tilfarið upp eftir skúlum ella landspørtum. Tilfarið er eisini at finna á okkara heimasíðu www.health.fo og á www.espad.org.

Vinarliga

Pál Weihe
Yvirlækni, professari
216696